## DAGSINS MEINING

# Fólkatingsval

Alt bendir nú á, at val verður útskrivað til danska fólkatingið ein av næstu døgunum. Stjórnin stendur seg óvanliga væl í veljarakanningunum. Val skal jú verða í ár og verður valið ikki útskrivað nú, so kemur eitt valstríð seinni í ár at renna saman við nøkur stór og trupul mál, sum skulu avgreiðast. Tað største málið í so máta er tann nýggja regionala skipanin og nýggja kommunala skipanin, ið kann koma at skapa stórar trupulleikar fyri stjórnina. Forsætisráðharrin hevur tí lítið í at velja uttan at skriva út nýval nú.

Eitt nýval nú kemur andstøðuni á fólkatingi illa við. Hetta er tó helst galdandi uttan mun til, hvør valdagurin verður. Forsætisráðharrin er tikin úr leikum sum taktikari og er kendur fyri altíð at hava ein trumf í ermuni, sum hann tekur fram í evstu løtu. Hesuferð er trumfurin vælferðarsamfelagið. Eftir í áravís at hava dundrað móti vælferðarsamfelagnum, eitt nú í bókini Minimalstaten, blæsir Fogh nú í lúður at fylkja allar flokkar til verju fyri vælferðarsamfelagnum. Hann er farin út við politikkinum hjá sosialdemokratunum og heitir á allar góðar kreftir ikki minst sosialdemokarnar sjálvar um at fylkjast um vælferðarstatin! Kyniskt? ja. Karrátt? ja, men sera smart. Ein øvugtur Blair, sum fór út og „stjól" nýsosialliberalismuna frá John Mayor og konservativa flokki hansara.

Donsku sosialdemokratarnir standa sum nelgdir! Vita sær ikki síni livandi ráð. Hvussu skulu teir kunnu fara í álop, tá mótstøðuhøvdingin mælir dønum til at reka teirra egna vælferðarpolitikk, sum teir hava havt patent uppá í heila øld? Hetta minnir um ein ávísan býráðspolitikkara í Havn, sum á sinni fyrst varð valdur uppá síni mótmæli móti nýggju svimjihøllini fyri síðan at verða valdur, tí hann eftirfylgjandi megnaði at taka sær æruna av høllini! Soleiðis kann tað vera við politikki við hvørt. Men bert við hvørt, tíbetur! Einasta vónin hjá Lykketoft og flokki hansara er, at danski veljarin hesaferð gjøgnumskoðar Fogh - at veljarin ásannar, at hetta heilt einfalt er ov tjúkt og ov feitt. Hvussu skal ein forsætisráðharri, sum soleiðis ger alt til eitt taktiskt spæl, varðveita sítt trúvirði? Tað fáa vit skjótt at síggja.

Hvussu verður so her heima hjá okkum? Tað er ilt at spáa um valið longu nú. Valið verður so veljarans meting av samgonguni, tað noyðast allir partar at ásanna. Hetta vita samgonguflokkarnir og fara tí at leggja alla orku í at vinna valið. Rembingarnar í ávikavist sambandsflokkinum og tjóðveldisflokkinum kunnu fara at ávirka úrslitið negativa vegin, men hetta er als ikki givið í forhond. Tað kann eins væl virka øvugt og koma at bjarga báðum flokkum fólkatingslimirnar aftur. Fyri tjóðveldisflokkin snýr valið seg m.a. um at varðveita ein sera týðandi politiskan plattform, nú flokkurin ikki fekk Norðurlandaráðið. Vit skulu tí rokna við sera hørðum valstríði frá hesum flokki, eins og mongu stríðsøksirnar ivaleyst fara at verða jarðaðar til valið er farið afturum í hvussu so er. Javnaðarflokkurin og fólkaflokkurin tráa eftir fólkatingssessunum og fara teir tí ikki at reka minni hart valstríð. Valstríðið kann fara at órógva politiska arbeiðið álvarsliga. Hetta krevur, at flokkar sýna ábyrgd og ansa eftir at politiska lívið ikki verður lammað tær komandi vikurnar. Tað vildi verið spell, tí stór mál eru á politisku dagsskránni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er Suðuroy ein partur í Føroyum?

**Rúni Lisberg**
*Sumba*



Til allar suðuroyingar.
Fyrsta treytin fyri vinnuligari menning í Suðuroy, er ein hugburðsbroyting hjá okkum sjálvum.

Tað hendir ferð eftir ferð, at tá onkur roynir at seta okkurt í verk her suðuri, so eru nøkur sum við øllum hundakunstum og við spillandi tungu vilja niðurbróta tað, sum bygt verður upp.

Vælsignað gevist við slíkum, tit eru so fá (tíbetur) sum eru niðurbrótandi, men ótrúliga ávirkan hava tit. Royni tit eisini at stuðla teimum, í á ymsan hátt stríðast fyri at fáa okkurt upp á føtur her suðuri, tað er eisini brúk fyri tykkum.

**Til okkara fólkavaldu**
Tað finnast enn nógvir møguleikar , sum fólk við tykkara valdi kunnu gera fyri okkum her suðuri.

Gott nokk koma okur nú sjálvir at reka fiskavirkini nú, eftir at Fiskavirking stakk halan millum beinini, eftir at hava tvíhildið um virkini í langa, langa tíð.

Men eitt mugu tit vita, at er tað so at flutningsstuðul og nakað av rakstrarstuðuli skal til fyri at hjólini aftur skulu mala í Suðuroy, so hava tit bert eitt at gera og tað er at geva stuðulin.

Ein slíkur stuðul kann vera afturgoldin, tá ið vinnan aftur gevur avkast.

Nú ræður um at fáa gongd í aftur og tað beinanvegin.

340 fólk ganga við ongum arbeiði her suðuri. ALS og Almannastovan skulu gjalda uml. 3 milliónir krónur í arbeiðsloysistrygging hvønn mánað til hesi fólk.

Hetta er eisini peningur, sum Føroya fólk má gjalda, men her verður goldið fyri onki arbeiði. Eg skilji ikki, at stuðul til vinnuna ikki er ein betri loysn, sjálvt um hetta kanska er dýrari. Eitt er so vist, nakað kemur væl burturúr fiskinum, eisini her suðuri.

Mær vitandi eru fýra bólkar av ungum monnum her í Suðuroy, sum hava søkt um loyvi til at fiska Svartkjaft. (Hetta fiskaslag er ikki umfata av nakrari kvotaskipan).

§2. stk 1. í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap sigur, at fiskurin er ogn Føroya fólks og skal tryggja støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið.

Sandoy og Suðuroy hava onki svartkjaftaloyvi fingið.

Eg vil heita á tykkum um enn einaferð, at taka hesar umsóknir og gjøgnumganga tær, hesaferð við vælvild.

Somuleiðis verður heitt á tykkum, um at eftirhyggja teir nógvu almennu grunnar og tey nógvu fólk, í skulu eitast at kunna vegleiða og stuðla føroyskari vinnu. Nógv av hesum kenna seg alt ov trygg, plantað á sínum stóra, flata afturparti, í djúpum lenistólum, fyri stórar almennar lønir, uttan at gera peningsverk.

Ruddið her og latið fólk, sum ynskja vinnuni framgongd, sleppa framat.

**Miðnámsskúla og Ellisheim**
Nógv hevur verið tosað um Miðnámsskúla og Ellisheim. Hetta kemur sjálvsagt væl við hjá okkum her suðuri. Men ímillum Miðnámsskúla og Ellisheim skulu helst verða eini 50-60 ár, tað kann ikki verða meiningin at vit skulu arbeiða og liva hesi árini norðanfyri, fyri síðani at flyta suðuraftur á Ellisheim tá vit eru 70-80 ára gomul. Sum nú er, eru vit helst noydd til hetta, men vónandi vendur gongdin til tað betra.

Ongantíð áður hevur Suðuroy verið so "væl" umboðað politiskt sum nú. Einir 10-11 hálvir og heilir suðuroyingar sita og stýra okkara landi í dag, um ikki tit kunnu skilja støðu okkara, hvør skal so. Royndin liggur á borðinum framman fyri tykkum, um tit ikki klára hana, so bakki út til næsta val, allir sum ein.

Nú er nokk bíðað.

# Regeringen + DF medskyldige i landsforræderi

**Odmar Kúrberg**

Da der blev indgået en aftale om at gå ind i Irakkrigen, var det nødvendigt for Regeringen +DF at gøre sig medskyldige i Landsforrædderi, og det kan ikke godtages af os, der er blevne forrådte. Det drejer sig om at Lisbeth Lindenskov Pedersen stemte for, mod 96% af sin befolkning. Men så en arrogant regering som den her skider højt og flot på alle reslutioner som kommer fra FN.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.